# VEÐRIÐ Í KIRKJUBØ



## FEBRUAR 2025

## VEÐURSTOVA FØROYA

# Innihald

Veðrið í bygdini ........................................ 3

Norðan ........................................ 5

Landnyrðingur norðan ........................................ **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**

Landnyrðingur ........................................ 6

Landnyrðingur eystan ........................................ **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**

Eystan ........................................ 6

Landsynningur eystan ........................................ 7

Landsynningur ........................................ 8

Landsynningur sunnan ........................................ 9

Sunnan ........................................ 9

Útsynningur sunnan ........................................ 10

Útsynningur ........................................ 10

Útsynningur vestan ........................................ 11

Vestan ........................................ 12

Útnyrðingur vestan ........................................ 13

Útnyrðingur ........................................ 13

Útnyrðingur norðan ........................................ 14

**Dagfesting**: 18. februar 2025

**Staður**: Heima á Garði 1 – 175 Kirkjubøur

**Heimildarfólk:** Jóannes Patursson

**Viðtal við**: Hanus Kjølbro

# Veðrið í bygdini

Bygdin Kirkjubøur er staðsett í einari líð, sum vendir í útnyrðing og landsynning.

Norðan- og eystanfyri er ein slætti, nevndur Kambur (303m). Hann verjir væl, tá ið hann liggur høgt, men ger, at eysturættirnar (*landnyrðingur og eystan*) eru keðiligar og strævnar.

Beint oman fyri bygdina eru Skorðarnar. Liggur hann beint inná tær, drepur uppi. Áirnar renna niðaneftir, og tað kemur ikki dropin til bygdina. Innan fyri hólman er púrasta stilli, men úti fjørðinum kann vera illveður.

Skorðarnar halda fram í landsynning út í Heimari Líð og Ravnabjørgunum og Flatuskorðum og so koma vit út á Bø.

Úr landsynningi suðurum og upp í útnyrðing er Hestfjørður. Landsynningur og útnyrðingur strekkja fjørðin. Landsynningur kemur uttan av havi og er næstan altíð vátur; útnyrðingur turrur.




*Mynd 1: Sunnasti partur av Streymoynni. Pílarnir peika ímóti Kirkjubø.*

Fyri at fáa greiði á, hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum í Kirkjubø, setti undirritaði seg í samband við Jóannes Patursson. Hann er uppvaksin í aldargamla bóndagarðinum, og hevur sitið við festinum við størsta markatalinum í landinum í skjótt í ein mansaldur. Hann beyð mær at vitja seg í Oyndarfirði at gera samrøðu um veðrið. Við mær var Andrias Gregoriussen, starvsfelagi á Veðurstovu Føroya.

Við til samrøðuna, sum var í heiminum hjá honum Heima á Garði 1 í Kirkjubø hevði eg spurnarblað til 16 ættir – tær 4 høvuðsættirnar og hálvættirnar umframt tær 8 millumættirnar:

- Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt
- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?

- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar.




*Mynd 2: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan

Norðan liggur oman av Snið og er ein sera góð ætt í Kirkjubø.




Beinur norðan er besta ættin í Kirkjubø. Tað er lítil vindur í Kirkjubø, og fyri tað mesta er púrasta stilli og klárt. Tað er bert í øgiliga nógvum vindi, at tey merkja nakað til hann, ella at hann byrjar at gera fortreð. Í vanligum illveðri er ikki neyðugt at fara út at tryggja leysar lutir í bygdini. Tá ið illveður er av útsynningi, og hann gongur upp, er sloppið, tá ið hann er komin upp í norðan. Sum góðveðursætt er norðan eisini góð. Eingin vindur, turt og klárt.

Er liggjandi høgætt, liggur eitt hátrýst vanliga vestanfyri, og tað er tí næstan altíð turt, tá ið hann er norðan. Góð terraætt. Um veturin, tá ið tað kavar, er tað vanliga so lítil vindur, at kavin dettur beint niður – leggur seg ikki í skalvar. Er eitt lítið lot, fýkur ein partur av kavanum vekk, so hvørt hann kemur niður, og seyðurin kann tí skava seg niður til grasið. Er bert eitt sindur av kava á bønum og klárt í veðrinum – sól ella sólglottar – fer stórur partur av kavanum vekk vekk um dagin.

Norðan er ikki mjørkaætt í Kirkjubø.

Norðan er ikki brimætt í Kirkjubø. Árnanes lívir fyri. Tað er púra slætt útfyri, uttan so at tað rekur upp í ættina. Úti á Bø kann vera brim.

Er nakað av vindi, kann vera gjálvut og óslætt úti í fjørðinum eitt sindur útfrá, hóast tað er sum á gólvinum inni við og stilli í bygdini. Tá skal man ansa sær á báti. Úti á Bøboðunum er ein siglirenna tætt fram við landi, men tað er so grunt í bæði borð, at tað kann bróta við stórum brotum, áðrenn ein veit av. Teir sum sigla har ofta, kenna siglirennina og duga at sigla har.

Norðurættin er ikki tann besta, tá ið farast skal út í Høvdan. Har er ikki kyrt, uttanso at hann fer niður um 5-6 m/s. Tá er fjørðurin eisini góður at fara tvørturum, *tó má man ansa sær á vestfallinum – tá rekur upp í ættina*.

## Landnyrðingur og eystan – og landnyrðingur eystan

Í Kirkjubø er lítil munur á ættunum úr landnyrðingi norði og niður landsynning eystan. Tá kemur hann oman av Skorðunum, og tað er næstan altíð keðiligt veður í Kirkjubø. Undir einum kalla tey tað eysturættirnar. Bara tað kantar útiá, so vita tey, at tað eru hesar keðiligu ættirnar.




Lotið kemur omanav á eysturættunum, og vindurin er ójavnur í bygdini og beint útfyri við hvirlum. Hetta er serliga heimi í bygdini. Í nýggjara partinum av bygdini har inni og ovast er tað ikki líka ringt. Vindferðin er fitt oman fyri miðalvindferðina kring landið. Tað er bert í sera lítlum vindi, at tað er stilt í Kirkjubø. Fer hann upp um 6-8 m/s, merkist hann væl í bygdini. Í frískum vindi – um 10 m/s – er gjøgnumtrekkur, og tað kølnar í húsi, har sum kjallarar eru opnir.

Landnyrðingur er ein vát ætt, meðan eystan er turrari. Orsøkin kann vera, at landnyrðingur kemur innan av Norðurhøvum. Á eysturættini skal lotið fyri upp um Nólsoynna, áðrenn tað rakar Kambin.

Á beinum eystri kann vera liggjandi turrveður vil køldum veðri – tømingur (*hæsingur*) – men kennist sum píningur. Hetta er ofta í mai mánað, tá ið seyðurin er farin av bønum. Alt steðgar. Grasið veksur ikki, og einki er at bíta. Lombini veksa ikki.

Um veturin kann nógvur kavi leggjast á landnyrðingi. Fer kavi at rúka, er ættin landnyrðingur norðan ella lægri. Kavi legst eisini á eysturættini, men ikki líka nógv sum á landnyrðingi.

Fer at kava á landnyrðingi ella eystri, kunnu skalvar hanga niður úr Skorðunum, tí tað er næstan altíð altíð eitt fitt lot – meira vindur enn á norði. Tað kastar rangt, tá ið hann kemur omanav, og kavin fer í skalvar og fannir. Tú veitst ikki hvar hann endar.

Í 1765, tá ið skalvur leyp í Klaksvík, og 20 fólk doyðu. Sama dag leyp eisini skalvur í Kirkjubø, og hann smildraði nógv fyri sær oman fyri kirkjuna. Ættin hendan dagin hevur helst verið landnyrðingur ella landnyrðingur eystan, tí norðan leggur ikki skalv á Skorðunum.

Í Trøllhøvda er næstan ongantíð kavi. Hann liggur so væl fyri, at hann fær tað sindri av sól, sum er um veturin.




Á eysturættunum kemur mjørkin omanav Skorðunum, men hann fjalir sjálvdan bygdina. Kemur oman ímóti bøgarðunum. Tað er bert í heilt lítlum vindi, at mjørkin fyllir omanav og fjalir bygdina. Kemur ikki ofta fyri.

Tað sæst væl, tá ið ein kemur úr Havn við bili og koyrir í greytasvørtum mjørka niðan ígjøgnum Havnadal. Komin á Velbastaðháls, er klárt í erva, men fjørðurin er allur huldur í mjørka. Verður koyrt víðari er aftur greytasvart í mjørka oman fyri Velbastað, og tá ið ein er komin suður ímóti Gomlurætt, ella knapt tað, er aftur púra klárt allan vegin heim til Kirkjubøar.

Okkurt árið hevur mjørki ikki verið hinumegin (*t.e. í Havn og á Argjum*), men mjørkin kann leggja eina skaddu yvir allan Kambin stóran part av summarinum, og skadduvindur er niðurúr. Tá er grátt og kaldur skadduvindur í Kirkjubø, meðan tað er gott veður í Havn við sól. Fult av fólki í Sandagerði. Eisini við Leynavatn.

Eysturættirnar eru ikki brimættir í Kirkjubø. Tað skal nokkso nógv til, at fjørðurin gert keðiligur. Tað kann vra eitt sindur av vindaldu fra við landi, men ikki tað nógva brimið.

Ættirnar úr Landnyrðingi og niðureftir eru alt kyrruættir út í Trøllhøvda. Fjallmenn fara í keðiligum veðri við báti úr Kirkjubø, men tá ið komið er á hálvan Heystfjørð, er gott veður, og í Høvdanum er kyrra.

## Landsynningur eystan

Landsynningur eystan líkist eysturættunum – *sí omanfyri*.

## Landsynningur

Landsynningur kemur fram við landi til bygdina og er ein keðilig ætt í Kirkjubø.




Landsynningur er sjálvdan ein góð ætt í Kirkjubø. Tað er ofta fitt av vindi og regni. Eisini tá ið tað er góðveður kring landið. Í illveðri er vindurin javnur, men ættin er strævin – tó ikki skaðaætt. Tað skal lítið til, at landsynningur ger fortreð í bygdini – líkasum suðurættin.

Landsynningur er ein vát ætt í Kirkjubø, og ofta er kalt eisini. Kuldin kemur við lotinum. Fer ættin vesturum, er skjótt lýggjari, tí lendið er ikki kølt niður.

Landsynningur er ein vát ætt í Kirkjubø. Tað regnar ofta. Ofta liggur hann á eysturættunum í eina tíð, og í bygdini er ójavnur vindur og turt. Fer hann niður í landsynning, verður vindurin javnur, og tað fer altíð at regna.

Kemur landsyningurin allan vegin úr Evropa, serliga úr Danmark, er gott veður í Kirkjubø – lýtt og turt. Tað kann byrja við regni í ein dag ella tveir, og so leggur hann seg við turrveðri í dagavís (*tømingur*). Hetta hendir bert viðhvørt.

Tað vanliga er tó, at landsynningurin er partur av einum lágtrýsti um okkara leiðir, og tá kemur lotið uttan úr havinum og er váturin og keðiligur. Hann kann liggja soleiðis í nógvar dagar.

Sjóvarfallið kann ávirka regnið nokkso nógv, tá ið vindurin er lítil. Í eystfallinum rekur eitt sindur lýggjari sjógvur suður ígjøgnum fjørðin. Tá er vanliga turt. Eftir eystfalskyrrindi fer vestfallið, sum er eitt sindur kaldari, norður ígjøgnum fjørðin, og tekur regnið við sær. Tað sæst standa sunnan fyri Kirkjubønes og bíða, til rákið vendir.

Til fjallveður roynist landsynningur illa. Teir fara ikki á fjall á ættini, um teir sleppa undan. Mugu teir kortini á fjall, hava teir viðhvørt bíðað í nakrar tímar eftir eystfalskyrrindum, og so fáa teir nakrar tímar við turrveðri.

Landsynningur er góð ætt í Høvdanum, bæði til atkomu, fjallgongu og tann besta fleygaættin eisini.

Hóast keðiligt veður í bygdini á eysturættunum og á landsynningi, er vindurin nógv javnari í haganum omanfyri. Tey kunnu sita og ilskast inn á veðrið í bygdini, meðan tað er gott veður í erva.

Tað kann vera mjørki á landsynningi. Serliga um summarið.

Landsynningur er brimætt. Hann kemur inn av opnum havi, og liggur ættin leingi, kann verða nógv brim, og so er heldur ikki farandi um fjørðin.

## Landsynningur sunnan

Landsynningur sunnan er sum lamdsynningur

## Sunnan

Tá ið ættin er sunnan, kemur hann av Sandoynni og tvørtur um fjørðin.




Í Kirkjubø siga tey, at tað er sjáldan, at tey hava beinan sunnan. Hon er meiri at rokna sum ein skiftisætt og liggur vanliga ikki leingi. Hann sæst ofta í fjørðinum koma yvirum.

Tá ið hann er sunnan, er vindurin javnur, og vindferðin er sum kring landið. Í góðveðri á sumri er eisini gott veður í Kirkjubø, serliga um lotið kemur beinleiðis úr londunum sunnanfyri. Tá kann vera avfall av og á, men annars gott og stilt.

Tað skal lítið til av vindi, áðrenn hann fortreð í bygdini – líkasum á landsynningi. Tað er bert í púrasta stilli kring landið, og at tú ikki meira enn sær ættina, at tað er fínasta veður í Kirkjubø á suðuri.

Suðurættin er ikki góð í Kirkjubø í illveðri. Hann sæst taka í úti á fjørðinum, áðrenn hann kemur í land. Hann drepur ikki uppi, líkasum á útsynningi. Ættin er verri innast í bygdini enn har heimi. Áirnar omanfyri fara bæði vestureftir og niðaneftir.

Byrjar ein stormur á suðri, merkja tey hann væl. Fer hann í útsynningi, drepur uppi inn ímóti Skorðunum, og tað verður púra stilli. Tá ið ættin er komin upp í vestan, herjar vindurin á aftur. Ofta

er stormarnir uppá tað harðasta, meðan hann er útsynningur, og tá sleppa tey í Kirkjubø væl. Hetta er bert heimi í bygdini. Har inni er nógvur vindur alla tíðina.

Á vetri regnar ofta, tá ið hann er sunnan. Mest ælaveður. Hann kann eisini regna alt av sær yvir Sandoynni, men ikki altíð, og tað er langt yvirum til Kirkjubøar.

Sunnan er mjørkaætt í Kirkjubø. Serliga um summarið kann vera nógvur og tjúkkur mjørki. Okkurt summar hava tey ikki sæð út í hólman í 2 vikur fyri mjørka. Mjørkin sæst viðhvørt liggjandi tjúkkur koma oman av Sandoynni, men so steðgar hann, tá ið hann kemur inn á fjørðin og blívur burtur. Á henda hátt eru tey, sum fáast við landbúnað í Kirkjubø fegnari fyri suðurættina enn fyri eysturættirnar, tí tá kann vera skróvturt og skerpingur í bø og haga.

Sunnan er eisini brimætt í Kirkjubø, men ikki nógv brim. Úti á Bø og fram við landi út har er nakað brimi og í illveðri stór brot, líkasum á útsynningi.

## Útsynningur sunnan

Útsynningur sunnan er sum suðurættin.

## Útsynningur

Útsynningur kemur undan Halinum í Hesti og tvørtur um fjørðin til Kirkjubøar.




Útsynningur er góður heimi bygdini – t.e har tey sunnastu húsini eru. Í innasta parti av bygdini er hann ikki líka góður – serliga í ringum veðri.

Í góðveðri er ættin eisini góð í Kirkjubø við lítlum vindi og klárum lofti. Er nakað av vindi ella illveður av útsynningi, er púra stilt har heimi, men nakað av vindi har inni. Tað drepur uppi ímóti Skorðunum, sum eru oman fyri bygdina. Tá er ikki gott fjallveður, tí í erva er nógvur vindur.

Heima í bygdini er stilli í illveðri, tó at tað sæst í sjónum og hoyrist buldra í Skorðunum – tað er bert í ótrúliga nógvum vindi, at tey merkja vindin. Men áirnar omanfyri fara beint niðanav, og tað kemur næstan ikki vatn oman í bygdina. Har inni í bygdini er meira vindur, og innan fyri bygdina er ordiligt illveður.

Úti á Bø er ættin ikki góð. Har er nógvur vindur í illveðri.

Er illveður og hann gongur úr suðuri vesturum til útsynning, so er vindur brádliga vekk, tá ið hann er komin í útsynning. Men dunið av vindinum hoyrist væl, og tað sæst væl í sjónum eisini. Áirnar í Skorðunum fara uppeftir. Tey hava ikki ampa av veðrinum, so leingi hann liggur av útsynningi.

Í illveðri av útsynningi, og sagt verður, at hann fer at ganga upp ímóti vestri og at minka vindin, so er tað ikki hetta, sum hendir í Kirkjubø. Hóast broddurin er farin av illveðrinum, gerst veðrið keðiligt, tá ið hann er farin upp um útsynning og nærkast vestri.

Útsynningur er ikki ein góð ætt á fjørðinum. Tað ræður um at vera varin, tá ið siglt verður t.d. út í Koltur. Sæst vindurin taka í innan fyri hólmin á útsynningi, er ikki farandi á fjørðin við einum tíggjumannafari.

Tað er óvanligt við mjørka í Kirkjubø á útsynningi. Er mjørki, kemur hann suðureftir, men røkkur ikki til bygdar. Hann steðgar á Velbastaðhálsi og fer oman í Havnardal ístaðin fyri at koma suðureftir og kann eisini leggja seg langt niðan í hagan. Er eingin vindur, verður farið á fjall, tí klárt er omanfyri.

Útsynningur er ikki ring brimætt í Kirkjubø. Tað kann brima eitt sindur, og stór brot kunnu bróta ímóti hólmanum i ringum veðri. Tá ið hann er á veg upp í vestan, og vindurin er farin at merkjast í bygdini, kunnu stór brot vera úti í Líðini og úti á Bø – líkasum á suðuri.

## Útsynningur vestan

Útsynningur vestan er sum vestanættin.

## Vestan

Vestan kemur yvir um Hestfjørð miðskeiðis á Hestoynni til Kirkjubøar.




Vesturættin er ein rímiliga góð ætt í Kirkjubø við jøvnum vindi. Hon roynist væl um summarið – tað gera allar ættirnar úr vestri upp í norðan. Er gott veður kring landið, er vindurin enn minni í Kirkjubø. Í hvøssum vindi ella meir er ættin keðilig, tó at vindurin er javnur. Tað minnir eitt sindur um norðurættina, men tað er vanliga meiri vindur.

Vesturættin ger mest fortreð í endanum av stormi, sum er byrjaður í útsynningi ella lægri. Vanliga minkar vindurin, tá ið hann er komin upp í vestan, men viðhvørt minkar hann ikki fyrr enn nakrar tímar seinni. Tá er veðrið ógvuliga keðiligt í bygdini – tað kann rista og skelva ímillum hús. Ring illveðursætt.

Til vætu roynist vesturættin væl. Tað er rímiliga turt úr vestri upp í norðan, og góðar ættir til landbúnað – fjallveður, hoyggj, taðing v.m. Loftið er vanliga væl klárari enn t.d. á landsynningi. Avfallið, sum er á vestri, er úr brúgvaløgum, og tá regnar tað allastaðni í landinum.

Vanliga er ikki mjørki, tá ið hann er vestan. Er mjørki, fer hann vanliga ímillum Koltur og Hest og fer upp um Velbastaðháls. Kemur ikki heim til bygdina. Er stilt, er pollamjørki á fjørðinum innan fyri Hestoynna.

Vesturættin kann hava nakað av brimi viði sær í Kirkjubø. Tað brýtur, men vanliga ikki so nógv. Hestoyggin tekur tað mesta. Ættin skal hava ligið nakrar dagar, áðrenn aldurnar gerast stórar og tungar. Tá kunnu brotini vera stór ímóti Árnanesi, og tari legst á bø og veg og ímillum hús eisini.

Vestan er ikki kyrruætt í Trøllhøvda. Verður farið út í Høvdan á vesturætt, er tað í góðum veðri, og lagt verður at á innarusíðu. Er komið út í øllum góðum, er líkindini góð, og nógv fæst frá hondini – seyðarakstur ella fuglafleyg. Í nógvum vindi kann tað bróta rundan um allan Høvdan, bæði á innaru- og uttarusíðu og langt eystureftir undir Skopunarlandinum. Líkindini í Høvdanum síggjast væl, tá ið farið verður út á Bø við kikara.

## Útnyrðingur vestan

Veðrið á útnyrðingi vestri líkist veðrinum, tá ið ættin er vestan.

## Útnyrðingur

Útnyrðingur kemur suður ígjøgnum fjørðin og er ein hampuliga góð ætt í Kirkjubø.




Vindurin av útnyrðingi er javnur fram við landi suður ígjøgnum fjørðin. Tá ið ættin er oman fyri vestan, kenna tey seg tryggari við veðrinum. Vindferðin á ættini er tann sama sum fyri landið, og eitt vet meiri vindur er enn á norði.

Tá ið illveður er byrjað av vestri ella longur niðri, kunnu tey ganga heilt upp í útnyrðing. Tá minkar vindurin vanliga nokkso skjótt, og veðrið verður betri. Hann kann viðhvørt liggja eina góða løtu, men vindurin er javnur, og ættin er ikki skaðaætt.

Ættin roynist væl til avfall – tað gera allar ættirnar úr vestri upp í norðan. Góðætt til hoyggj á sumri. Er avfall á ættini, hevur hann gjørt tað av sær onkra aðrastaðni.

Útnyrðingur er ikki mjørkaætt í Kirkjubø. Mjørki kann vera norðuri í fjørðinum, men hann røkkur ikki til bygdina. Mjørki kann eisini liggja úti á fjørðinum, men kemur ikki inn. Hann kann eisini liggja á Kirkjubønesi og suðuri á Bø, men oftast er klárt í Kirkjubø.

Tað er ikki brim í Kirkjubø á útnyrðingi. Hann kann vera vandamikil á fjørðinum, tá ið nakað av vindi er, og tað er vestfall – t.e. tað rekur upp í ættina. Tá ið hann liggur av útnyrðingi, er eingin havalda, bert vindalda, og hon fer suður ígjøgnum fjørðin.

Ein strongur er úr landi norðan fyri bygdina í Hesti. Hann strekkir nokkso langt út á fjørðin norðureftir. Hann sæst væl, tá ið hann rekur upp í ættina. Hetta er Kirkjubáran. Navnið er komið av, at ein bátur, sum hevði ført fólk í kirkju, gekk burtur. Tað kann vera fínasta veður á fjørðinum, men stór og ógvuslig brot í Kirkjubáruni á vestfallinum.

## Útnyrðingur norðan

Veðrið á útnyrðingi norði líkist veðrinum, tá ið ættin er norðan.